# RANNVÁ VIÐ **DUSTSÚGVARA** OG PENSLI

– EG **TÍMI** IKKI AT **SPILLA** MÍNA TÍÐ TIL AT GERA **MYNDIR**, SUM ONNUR **LONGU** HAVA GJØRT, SIGUR LISTAKVINNAN **RANNVÁ KUNOY**. Í STAÐIN **DUSTSÝGUR** HON SKAP ÚR **MYNDUNUM** HJÁ ØÐRUM OG **MANIPULERAR** TEY TIL SÍNI **EGNU** SERMERKTU VERK, SUM NÚ VEKJA **ALTJÓÐA** ANS



**LIST**
Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

Til endan hittu tær ein, sum segði »ja«. Tá høvdu 14 ára gamla Rannvá Kunoy og mamma hennara eisini bankað á hurðina hjá flestu listamálarum í Havn fyri at spyrja, um ikki onkur vildi taka gentuna í læru.

– Eg trúði, tað var lygn, tá Eyvindur Mohr segði ja. Tað einasta, eg vildi, var at mála, og nú slapp eg at sita har og síggja, hvussu ein veruligur listamaður arbeiddi. Tað var heilt fantastiskt.

Í eitt ár á tamb sat Rannvá trúliga og eftirlíknaði strokunum hjá roynda listamálaranum. Dreymurin var tó ongantíð at fáa myndirnar at líkjast, tí longu tá hevði unga listakvinnan nakað heilt annað í kvittanum.

– Eg havi altíð kopierað myndir hjá øðrum fyri at vita, hvussu eg kann manipulera tær til okkurt annað. Listasøgan er jú túsund ára gomul, alt er gjørt fyrr, og tí hevði tað verið spill av míni tíð at skapað kompositiónir, sum longu eru gjørdar, sigur 34 ára gamla listakvinnan á sín sermerkta blíða men avgjørda máta.

### Okkurt byrjar

Í heila tikið er Rannvá Kunoy rættiliga avgjørd í sínum meiningum um list. Og eins og fyri at ongin ivi skal vera, endurtekur hon ofta síni poeng tríggjar ferðir, og heldur til dømis at seinnu kvinnumyndirnar hjá Picasso er tað »besta, besta, besta«, hann nakrantíð gjørdi og leggur annars áherðslu á, at hon »ongantíð, ongantíð, ongantíð« fer upp á kompromis við síni list.

Tað fær prentarin Jan Andersson at merkja hesa løtuna á grafiska verkstaðnum á Skálatrø, nú Rannvá Kunoy fyrireikar sína fyrstu framsýning í Føroyum í 10 ár. Meðan hon prátar og greiðir frá, heldur hon neyvt eyga við prentaranum, sum tolin ger eftir hennara boðum og kemur við einum útkasti fyri og øðrum eftir, sum verða hongd upp á veggin.

> *Um tað bara er áskoðarin, sum ger av, hvat hann sær á myndini, eri eg dumpað sum listakvinna*

Rannvá setur svørtu brillurnar á nøsina.

– Hmmm ... áhugavert, men hatta er ikki tað yellow, eg hugsaði. Eitt sindur meir spíss í ... kanst tú ikki ... ?

Eina løtu hvørva tey bæði inn í eitt hitað kjak um tónar av gulum, litspíssar og fernis.

Á gulu myndini hómast skapið av einum avskeplaðum høvdi ella einum illfýsnum skýggi ella kanska einum eldgosi, sum eins og dandar aftur og fram úr eini friðsælari toku.

– Eg royni at finna eitt úttryk, har okkurt er í ferð við at fáa skap, eitt stað millum lív og onki, eina byrjan, har okkurt kanska er við at henda. Prosessin hevur stóran týdning fyri meg, og tað hevur formurin eisini, men eg vil ikki verða fangað í antin øðrum ella hinum, sum flestu listafólk verða. Eg vil sleppa at arga við at spæla við bæði.

**Men er tað ikki bara ein sofistikeraður máti at siga, at tú ikki fært tikið støðu til tað, tú gert?**

Rannvá flennir.

– Nei, nei. Also eg eri til dømis ikki áhugað í at vísa angist, ella pínu ella sorg við einum ekspressionistiskum úttrykki. Eg elski at ganga á slíkar framsýningar, men reint ekspressionistiskir málningarnir eru ikki nokk fyri meg. Hinvegin vil eg heldur ikki sleppa áskoðaranum fullkomiliga uppá fjall í eini suppu av prosess ella abstraktum formum. Áskoðarin skal trúgva uppá mínar myndir.

**Trúgva uppá tær – hvussu tá?**

– Ja. Hvørjum hevði tú trúð meir – eini fotomynd av mær á gøtuni í London ella einum málningi av mær á gøtuni í London?

**Fotomyndini?**

– Nettupp, tí málningurin hevði havt penslastrok, sum minti teg á, at onkur hevði *gjørt* myndina. Eg royni at geva mínum myndum nakað fotografiskt yvir sær, har tað ikki síggjast spor eftir mær sum listakvinnu fyri at skapa eina illusión av nøkrum, sum bara er til í verðini, sum kanska er veruligt.

### Stýrir við harðari hond

»Veruligt« við ávísum fyrivarni, má nokk skoytast uppí, tí tilvitanin um seg sjálvt sum listaverk er altíð ein avgerandi partur av listini hjá Rannvá Kunoy, har listasøguligar tilsipingar liggja og lúra allastaðni. Eitt nú er fabrikslistin hjá Andy Warhol rættiliga nærverandi í prentunum, sum Jan Andersson stendur og rullar út yviri við prentmaskinuna.

– Mær dámar kitlandi kensluna, har man endurtekur okkurt umaftur og umaftur og umaftur, til man ríðir á markinum, har tað verður meiningsleyst og oyðilagt. Tann kenslan verður deiliga vandamikil, tá tú prentar á effektivum maskinum, sum her, sigur Rannvá í tí Jan Andersson rullar enn eitt útkast av gula prentinum úr maskinuni.

– Yes, yes, yes! Printer's yellow! Ikki náttúru yellow, ikki krops yellow, men PRINTER'S yellow. Akkurát soleiðis.

▶